# Løgreglan nógv at gera

**Tað hevur verið nógv at gjørt hjá løgregluni um vikuskiftið, og millum annað vil løgreglan hava hjálp frá vitnum til eitt harðskapsmál klokkan 5 leygarmorgunin**

Leo Poulsen




Tað vindur alt meiri upp á seg, at harðskapur kemur upp í leikin. Fólk verða sligin púra ómotiverað, og serliga seinasta hálva árið hava nógv slík mál verið fyri.

Leygarmorgunin um 5-tíðina varð ein maður av grønlendskum uppruna álopin av trimum ungum monnum á vegamótinum Tróndargøta-Kongagøta. Hann var bæði sligin og sparkaður og endaði á skaðastovuni. Álopni maðurin kendi ikki hesar tríggjar ungu menninar, og løgreglan vil fegin frætta frá fólki, sum kunnu hava sæð hendingina.

Tríggjar ferðir var løgreglan boðsend til húsaófrið, og í trimum førum mátti løgreglan upp í leikin tá boðað var frá gøtuófriði. Í einum føri koyrdi ein bilur á beinini á einum manni, sum endaði á skaðastovuni.

Í seks førum varð boðað frá herverki á bilar, og løgreglan tók tveir fullar persónar upp um vikuskifti.

Eitt innbrot var í Klaksvík, har brotið var inn í ein handil. Rúturin varð knústur, og gerningsmeninir sluppu avstað við nakað av peningi frá kassanum.

Eisini var stuldur framdur í einum skeinkistað í Havn, har gerningsmenn sluppu avstað við út við 2000 krónum.

Tríggir bilførarar vórðu tiknir fyri at koyra við kenning í Havn, og í Suðuroy gjørdi løgreglan ferðakanningar. Fýra fingu klipp í koyrikortið umframt at fleiri bøtur vórðu skrivaðar.

Løgreglan gjørdi eisini kanningar í sambandi við at Norröna kom á Havnina, og har varð ein maður tikin fyri at koyra bil í frákenningartíðini.

# Avreiðingarvirðið vaks í 2010

Avreiðingartølini fyri 2010 vísa, at samlaða nøgdin var áleið tann sama sum í 2009 meðan avreiðingarvirðið royndist væl betri– virðið øktist góðar 130 milliónir ella 17%.

Hóast avreiðingarvirðið í 2010 var væl betri enn fyri árið 2009, so var virðið í lægra laginum samanborið verður við undanfarin ár. Á myndini niðanfyri sæst, at 2002 varð besta árið tá avreiðingarvirðið nærkaðist 1,4 milliardum, tað er nærum 500 milliónir hægri, enn avreitt varð fyri í fjør.

## Nøgd og virði 2010 í mun til 2009

Samlaða nøgdin av botnfiski minkaði nakað í 2010. Hetta komst av, at nærum ein fjóðring minni av upsa kom uppá land í 2010. Tó var tað avreidda virðið á upsanum á leið tað sama sum í 2009. Virðið á toskinum øktist um 40 % meðan nøgdin av toski vaks 30%. Hýsufiskiskapurin var nakað lakari, meðan avreidda virðið á hýsuni hækkaði 15%.

Fyri at síggja tær størstu broytingarnar í veiðuni í 2010 í mun til 2009, so skal hyggjast eftir nøkrum av fiskasløgunum, sum í talvuni eru bólkað undir "annar botnfiskur". Fiskasløgini brosma, longa og blálonga hava samantalt nærum tvífalda sítt avreiðingarvirðið. Nøgdin á hesum fiskasløgum vaks í 2010 við áleið einum triðingi í mun til 2009.

Av flatfiski var nakað minni avreitt í 2010, meðan virðið vaks nakað. Serliga var væl minni av svartkalva avreiddur í fjør í mun til 2009, harafturímóti hækkaði nøgd og virði á havtaskuni, skrivar Hagstova Føroya á sínari heimasíðu.




Avreitt í nøgd og virði um avreiðingarskipanina, jan. – des. 2009 og 2010

| | Nøgd í tonsum | | | | Virði í 1 000 kr. | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2009 | 2010 | Munur | % munur | 2009 | 2010 | Munur | % munur |
| **Botnfiskur samantalt** | **80.758** | **74.353** | **-6.405** | **-8** | **567.282** | **684.104** | **116.822** | **21** |
| - Toskur | 10.824 | 13.820 | 2.996 | 28 | 138.553 | 193.257 | 54.704 | 39 |
| - Hýsa | 5.216 | 4.907 | -310 | -6 | 47.868 | 55.492 | 7.624 | 16 |
| - Upsi | 53.175 | 40.256 | -12.919 | -24 | 295.704 | 294.671 | -1.033 | 0 |
| - Annar botnfiskur | 11.543 | 15.371 | 3.827 | 33 | 85.157 | 140.684 | 55.527 | 65 |
| **Flatfiskur samantalt** | **4.925** | **4.461** | **-464** | **-9** | **105.889** | **110.951** | **5.061** | **5** |
| - Kalvi | 192 | 160 | -32 | -16 | 7.353 | 7.581 | 228 | 3 |
| - Havtaska | 1.795 | 2.112 | 317 | 18 | 47.733 | 58.665 | 10.932 | 23 |
| - Svartkalvi | 2.287 | 1.491 | -796 | -35 | 43.744 | 35.435 | -8.309 | -19 |
| - Annar flatfiskur | 652 | 699 | 46 | 7 | 7.059 | 9.270 | 2.211 | 31 |
| Onnur fiskasløg | 22.122 | 21.781 | -340 | -2 | 87.123 | 94.374 | 7.251 | 8 |
| Skeljadjór | 3.325 | 4.659 | 1.334 | 40 | 9.933 | 11.502 | 1.568 | 16 |
| Rogn, sil, livur | 314 | 253 | -62 | -20 | 1.625 | 1.473 | -153 | -9 |
| **Samantalt** | **111.444** | **105.507** | **-5.938** | **-5** | **771.852** | **902.403** | **130.551** | **17** |